Toll- og Skattstova Føroya

# Málsviðgeri

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum.

Uppgávur stovnsins eru m.a. at fyrisita
• skattalógina
• tolllógina
• mvg-lógina
• kolvetnisskattalógina
• avgjaldslógirnar,
eins og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja raksturin.

Á Suðuroyar Øki, har viðkomandi kemur at starvast, eru 11 starvsfólk.

*Lýsingin finst eisini á heimasíðu okkara www.tollskatt.fo*

*E-mail: suduroy@tollskatt.fo*

Á Toll- og Skattstovu Føroya, Suðuroyar Øki, er eitt starv leyst at søkja til setan 15. september 2002.

**Høvuðsuppgávur:** Eftirlitsarbeiði og málsviðgerð innan meirvirðisgjald, skatt, toll, innkrevjing o.a., herundir at geva ummælir í møguligum kærumálum.

**Førleikakrøv:** Tann, sum settur verður, skal hava roknskaparligan førleika, og tað er ein fyrimunur at hava arbeiðsroyndir innan roknskap og bókhald. Viðkomandi skal vera fyrikomandi og arbeiðssamur og kunna arbeiða sjálvstøðugt.

**Vit kunnu bjóða:**
- Eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis eisini er fakliga krevjandi og við møguleika fyri eftirútbúgving,
- klokkuskipan við flextíð,
- eitt sjálvstøðugt starv í góðum arbeiðsumhvørvi.

**Setanartreytir:** Løn- og setanarviðurskifti, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Stravsmannafelagið.

Núverandi setanarøkið er Suðuroyar Øki, men fevnir annars um Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí, og tann, ið settur verður, skal kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

Viðkomandi, ið settur verður, skal vera fúsur at luttaka í teimum útbúgvingarmøguleikum, sum Toll- og Skattstovan bjóðar, eitt ið merkonum, HD o.a. og taka lut í teimum skeiðum, sum stovnurin fyriskipar.

**Nærri frágreiðing** fæst við at venda sær til Margret Joensen, Økisstjóra, á tlf. 371051.

**Umsóknir:** Skrivlig umsókn saman við avritum av prógvum, ummælum og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir, skal vera Toll- og Skattstovuni í hendi í seinasta lagi 19. august 2002.

**Toll- og Skattstova Føroya**
Suðuroyar Øki
Postsmoga 69
FO-800 Tvøroyri


Lesið internet Sosialin !






GER KVETTIÐ!

Fyrstafloks seyðahegn
50 m X 90 cm
6 tráða

Yvir og undirtráður 3mm
Millumtráður 2,5mm
Meskavídd
B. 15cm H. 14cm til H. 22cm
Galvanisering 240 g/m²

Einans kr. 375,-

Fa. H.J. Michelsen
tlf. 314414 - 263707



Lýsið við brúktum bilum



Sosialurin
www.sosialurin.fo



HESTPRENT



BØKUR, BØKUR, BØKUR
og alt annað prent

Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 314 555
fax 318 026
hestprent@hestprent.fo



Sosialurin

Lesið Sosialin - tað loysir seg

www.sosialurin.fo


www.sosialurin.fo

# SØLUFÓLK
## til køksdeildina

**Køksmiðstøðin søkir eftir sølufólki at byrja beinanvegin.**

Vit kunnu bjóða tær eitt áhugavert starv í einum spennandi og fjølbroyttum umhvørvi. Løn og treytir verða ásettar í samsvari við útbúgving og royndir.

Vit vænta, at tú ert ágrýtin, stinn/ur, dugnaligur og dugur at veita viðskiftafólkum okkara eina góða tænastu.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi innan 20. juli 2002 og skal sendast til:

Køksmiðstøðin
Á Hálsi
110 Tórshavn
att: Vinjard Johansen

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsing um starvið fæst við at seta seg í samband við Vinjard Johansen, leiðara, á tel. 22 40 51

HTH Elkeyp Køksmiðstøðin
Á Hálsi • FO-100 Tórshavn • Tel. 31 49 49 • Fax 31 13 30


Sosialurin
-tað loysir seg


TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Pedagogur/hjálparfólk

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir pedagogi og hjálparfólkum til dagstovnin Kurl@.

**Størvini**
Talan er um eitt pedagogstarv, 35 tímar um vikuna og tvey tíðaravmarkað hjálparfólkarstørv, ávikavist 20 og 27 tímar um vikuna.

**Stovnslýsing**
Kurl@ er nýggjur stovnur, skipaður undir Trivnaðarfyrisitingini hjá Tórshavnar kommunu. Børnini eru í aldrinum 0 til 7ár, og eru foreldrini fyrst og fremst starvsfólk á Føroya Tele.

**Vit ynskja at tú**
- saman við starvsfólkunum ert við til at menna tað pedagogiska arbeiðið,
- dugir at virða og síggja tað einstaka barnið,
- hevur gott foreldra- og starvsfólkasamstarv,
- dámar at vera úti í náttúruni,
- ert í góðum lag tá tú ert til arbeiðis.

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett 1. september 2002. Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Kommunala arbeiðsgevarafelagið.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Duritu Dam, leiðara ella Gittu Hendriksen, varaleiðara,tlf. 35 35 00 ella støkk inn á gólvið á Sundsvegi 3.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Dagstovninum Kurl@, Sundsvegur 3, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 5. august 2002.

SNARSKIVAN

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## BROYTINGAR Í BUSSLEIÐINI Á ÓLAVSØKU

Í sambandi við ymisk tiltøk á ólavsøku 2002, eru hesar broytingar í Bussleiðini:

**Leygardagin 27. juli:**
**Leið 1** koyrir seinasta túr kl. $17^{53}$

**Sunnudagin 28. juli:**
Verður koyrt sum leygardag tó koyrir:
**Leið 1** Oman eftir Dalavegnum ístaðin fyri Varðagøtu/Tróndargøtu.
**Leið 1** koyrir ikki ímillum kl. $13^{23}$ og $17^{53}$
**Leið 2** koyrir ikki ímillum kl. $13^{08}$ og $18^{08}$
**Leið 3** koyrir ikki ímillum kl. $13^{09}$ og $18^{09}$

**Mánadagin 29. juli:**
Verður koyrt sum leygardag, tó koyrir:
**Leið 1** koyrir oman eftir Dalavegnum ístaðin fyri Varðagøtu/Tróndargøtu.
**Leið 1** byrjar at koyra kl. $12^{23}$
**Leið 2** byrjar at koyra kl. $12^{08}$
**Leið 3** byrjar at koyra kl. $12^{09}$

SNARSKIVAN






TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Útbjóðing

Tórshavnar kommuna bjóðar við hesum koyringina av bussleiðini út í almenna útbjóðing.

Møguleiki er at bjóða uppá eina, fleiri ella allar leiðir, sum eru leið 1, 2, 3, 4, 4x og skúlaleið.

Útbjóðingartilfarið fæst við at venda sær til:

Snarskivuna
Vaglið
FO-100 Tórshavn
Tlf. 31 51 60

Í seinasti lagi 5. august 2002.

Ímóti krossaðum kekki, ájlóðandi kr. 5.000,-, sum verður latið teimum bjóðandi aftur, tá ið útbjóðingartilfarið er latið Tórshavnar kommunu aftur.

Tilboðini skulu verða Tórshavnar kommunu, postrúm 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 15. august 2002 kl. 13.00, tá tey verða latin upp í býráðssalinum. Teir bjóðandi kunnu vera hjástaddir.

SNARSKIVAN